SKRÁSETING FØROYA
COMPANY REGISTRATION AUTHORITY

**Tíðindaskriv**

**Próvtøku at gerast løggildur grannskoðari.**

Nú verður møguleiki at tekna seg til próvtøku at gerast løggildur grannskoðari. Próvtøkan verður hildin á Føroya Handilsskúla í august 2015.

Fyri at sleppa til próvtøku at gerast løggildur grannskoðari krevst:

1) At umsøkjarin frá einum útlendskum handilsháskúla/universiteti hevur staðið eina útbúgving svarandi til grannskoðarakandidatútbúgvingina (cand. merc. aud.).
2) Útbúgving í føroyskum skattarætti.
3) At umsøkjarin í minsta lagi 3 ár eftir at hava fylt 18 ár, hevur luttikið í grannskoðaraarbeiðum, sum viðvíkja grannskoðan av ársrapportum ella tilsvarandi roknskaparrapporteringum í einum løggildum grannskoðaravirki og soleiðis, at minst 2 ár av arbeiðinum er framt, eftir at grannskoðarakandidatútbúgvingin er staðin.

Skráseting Føroya hevur sett eina próvtøkunevnd at skipa fyri próvtøkuni. Próvtøkunevndin hevur gjørt samstarv við donsku próvtøkunevndina undir Erhvervsstyrelsen og verður tann føroyska próvtøkan tann sama sum danska próvtøkan. Tó verða spurningarnir í skattarætti svaraðir sambært føroyskum skattarætti.

Próvtøkan inniheldur 3 modul, sum verða hildin í august 2015 við minst 10 dags millumbili. Modulini skulu standast innan eitt tíðarskeið á fýra ár.

Modul A: Próvtøkan er tveir tímar og viðvíkir siðalæru og óheftni.
Modul B: Próvtøkan er seks tímar og viðvíkir grannskoðara átekning og aðrar váttanir á roknskapin.
Modul C: Próvtøkan er fýra tímar og viðvíkir vinnulívsrætti, skattarætti, vinnufelagslóggávu og øðrum váttanum.

Í próvtøkunevndini sita:

Aina L. Knudsen, forkvinna
Eyðfinnur Jacobsen, sakførari
Fróði Sivertsen, grannskoðari
Heri Joensen, búskaparfrøðingur
Birita Sandberg Joensen, sakførari
Kitty May Ellefsen, ráðgevi, er skrivari hjá nevndini.

Umsókn um at sleppa til próvtøku skal vera Skráseting Føroya í hendi innan 1. mai 2015.

Meira um próvtøkuna fæst at vita við at venda sær til Skráseting Føroya.

Skráseting Føroya · Sigmundargøta 13 · Boks 264 110 Tórshavn · Tlf.: +298356010 · Fax: +298356015 · E-mail: skr@skraseting.fo